FØÐINGAR

21. februar fingu Esther Suðuroy og Dagfinn Olsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3720 gr.

10. feb. fingu Lucita og Sámal Jákup Sakarisson, Árhus, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3250 gr.

12. feb. fingu Guðrið Mohr og Torben Jensen, Keypmannahavn, tvíburar – gentu og drong. Gentan var 45 cm. og vigaði 1770 gr og drongurin var 46 cm. og vigaði 2150 gr.

15. feb. fingu Lis Samuelsen og Mass Hoydal, Árhus, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3450 gr.

15. feb. fingu Margit og Niclas E. Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3650 gr.

18. feb. fingu Fía og Hans P. Olsen, Oyndarfjørður, ein son. Hann var 49 cm. og vigaði 3200 gr.

18. feb. fingu Wilhelmina Poulsen og Fróði Olsen, Vágur, ein son. hann var 55 cm. og vigaði 4180 gr.

19. feb. fingu Jenny á Dalbø Guttesen og Heri Guttesen, Bøur, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3110 gr.

21. feb. fingu Hansa Sivertsen og Hardi Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 58 cm. og vigaði 5150 gr.

22. feb. fingu Sunrid Magnusdóttir Hansen og Sólfinn Hansen, Hellur, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3375 gr.

23. feb. fingu Gunvør og Eli Jan Falkvard, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3750 gr.

24. feb. fingu Elsebeth Danielsen og Oddmar Gulliksen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3700 gr.

25. feb. fingu Vivi Árnastein og Tomas Davidsen, Kvívík, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4200 gr.

26. feb. fingu Maria og Allan Joensen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4800 gr.

ANDLÁT

20.2
Jónhard Petur Joensen, í Norðragøtu, 53 ár
Olga Rasmussen, ættað úr Leirvík, búsitandi í Svendborg, 86 ár

21.2
Apolonia Kjølbro, Klaksvík, 60 ár

22.02
Maria Vestergaard, Lopra, 93 ár
Solveig Dam Pedersen, Fredericia, ættað úr Kollafirði, 77 ár

23.2
Ebba Hansen á Tvøroyri, 90 ár.
Amaliel Hansen, Klaksvík, ættaður úr Mikladali, 73 ár
Nicolai Nysted, Hvannasund, 78 ár
Eleonora Mathiassen, fødd Hansen í Havn, andaðist í Keypmannahavn, 100 ár

24.02
Olga Joensen, Fuglafirði, fødd Klein, 93 ár
Bergtóra Kristiansen, Fuglafirði, 73 ár

90 ÁR

2. mars fyllir Gigga við Keldu 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

TILTØK

Gudstænastur Sunnud. í føstuinngangi
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, Sverri Steinhólm
Kaldbak: kl. 12, Sonja Klein
Norðskáli: kl. 12, familjugudstænasta, Bergur D. Joensen
Oyndarfjørður: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Fugloy: Elsa Funding
Sandavágur: kl. 12, David Johannesen
Sjóvar kirkja: kl. 12, Jógvan Friðriksson
Funningur: kl. 12 messa, *Gjógv:* kl. 17 messa, Emil Olsen
Glyvrar: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalið. Talvan gongur fyri Heimamissiónina
Christianskirkjan: kl. 11, Hans Eiler Hammer
Húsar: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Fuglafjørður: kl. 12, Uni Næs
Tvøroyri: kl. 11, familjugudstænasta, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Heimamissiónina
Hvalba: Kl. 12.30 familjugudstænasta. Talvan gongur fyri Sunnudagsskúlan, Jónsvein Bech
Tjørnuvík: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Svínoy: kl. 12, Heri Joensen
Porkeri: sunnudagin gongur talvan fyri kirkjuligu heimamissiónina

Samkoman Rhema
Staravegur 5
Friggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Barnaklubbur.
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti við nátturða. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Lívdin
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30, talar Absalon Áargard um: Hvat segði Jesus um freisting? og tilbiðjanarmøti kl. 12, talar Jógvan Zachariasen um: 1. Korintbrøv – frælsi hins trúgvandi. Barnaansing er, fyri børn undir skúlaaldur, á báðum møtunum.

Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøld kl. 19.30 Bøn- og bíbiltími, úti á Fløtum.
Heimasíðan: www.livdin.fo

Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Sverra Steinhólm, Jens Lisberg og Krystel Jensdóttir syngja.

Ebenezer
Leygardagin kl. 16 Samkoma fyri eldri har Jonna og Hans Sivertsen luttaka.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 AWANA-kvøld.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA.
Kl. 20 byrjar møtiröðin har evnið er: Hirðatænastan.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Sunnivu og Hans J.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 10 Smálombini, kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti við Ólavi Jacobsen (frælsi frá ótta II), kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomuársfundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin (missiónsmøti).
Møtiskráin hja Filadelfia sæst á www.filadelfia.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti hjá Olivar.
Telefonandaktin 424 741.

Missiónshúsið Libanon
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týsdagin 3. mars kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Páskastevnan 2003
í Ítróttarhøllini á Skála.
Høvuðstalarar á stevnuni verða Hilda og Erik J. Bedsvaag, trúboðarar í Kenja og Envald Flåten, Noreg.

Keldan, Skálafirði
Friggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús. Filmur verður sýndur.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Lívsins Orð
Sunnudagin kl. 17 Møti við Lindu Højgaard o.fl.
Liljurnar møta mánadagin kl. 17. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

Sjómanskvinnuringurin í Runavík
samlast á Sjómansheiminum mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Tjørnuvík
Møti verður í bygdarhúsinum undir heitinum Kristus er svarið, sunnukvøldið kl. 18 v/ David Beck, Magda og Maibritt syngja. Kæri vinur kom og ver við.

Thabor, Fuglafjørður
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli í Thabor og á Kambsdali. Kl. 18 Sangmøti, har bæði barnakórið og Thaborkórið verður við.
Nátturði verður aftaná. Eisini verður innsavnan.

Missiónshúsið í Gøtu
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið 1. mars kl. 20 har Kristian á Reynatrøð luttekur.
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti í kirkjukjallaranum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Mizpa á Eiði
Sunnukvøldið kl. 18 tala Levi Joensen og aðrir, Kvartettin úr Betesda syngur.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen trb. Evni: Næstrakærleiki í meinigheitini, Lovsongsbólkur luttekur. Innsamling til húsið. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Elim í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18 luttekur Siloa kórið.

Gøta
Týsdagin kl. 20 Glyvra-Hanusars hús, bibeltíme: 1. Korintherbrev 15,1-28 v. Peter O. K. Olofson.

Tofta-missiónshús
Opið hús verður í kvld kl. 21-24. Øll eru vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Friggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Eivinn Bringsberg.
Hugnakvøldið við skuldi vera 1. mars er útsett til leygardagin 5. apríl. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 20 Kvinnurnar koma saman.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tey ungu luttaka við sangi og vitnisburði.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 11 Barnarbeiði (3) 4 til 6 ár, kl. 14 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. flokkur, kl. 16 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. flokkur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, Fritór Debes talar á báðum møtunum. Verið hjartaliga vælkomin.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Jesus á ferð niðan til Jerusalem

Hann var eisini greiður yvir hvat hendan ferð bar í sær.

Líka frá tí at hann var borin í henda heim, ja, so vóru tað kreftir, sum vildu hava hann tiknan av døgum. Men hvørja ferð hann skuldi takast og fellast í eini gerð ella orðum hann hevði talað, so funnust eingi nóg haldgóð prógv fyri at døma hann.

Hann var jú Guds heilagi og reini sonur.

Ja sjálvt um teir sóu allar vælgerðir hansara har lamin gingu, deyv hoyrdu, spidølsk vórðu reinsað, deyð risu upp o.s.v. so vildu teir hava hann tiknan av døgum. Men tímin var ikki komin.

Hann var bara enn á ferð ímóti hesum tíma.

Ein dagin møtti Jesus 10 spidølskum monnum á ferðini til Jerusalem. Hesir hildu til uttan fyri bøgarðarnar atskildir frá vinum og familju. Men so kom Jesus framvið.

So kom róp í, Jesus meistari miskunna okkum. Jesus hoyrdi, sá og steðgaði.

Frásøgnina kenna vit, allir blivu reinsaðir og kundu sameinast aftur við vinir og familju.

Allir 10 blivu reinsaðir, men bert hesin eini vendi aftur at siga takk.

Hesin eini upplivdi nógv meir, hendan dag enn allir hinir. Tá Jesus segði við hann: Trúgv tín hevur frelst teg.

Jesus steðgar eisini ídag og sigur komið til mín øll.

Hvørjum eru vit so lík, teimum 9 ella hesum eina og siga takk. Og fara glað upp í tað fylgið sum Jesus er hirði hjá og sum hann skal leiða heim í faðir hús.

Regin Høgnesen

TILTØK

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti.
Innsavnan til húsið. Øll eru vælkomin.

Prestagarðurin á Tvøroyri
Eldrasamkoma verður mánadagin 3. mars frá kl. 16 til 17.30.

Ungdómsmøti í Hvalba
Í samband við ungdómsmleguna sum er í skúlanum, verður ungdómsmøti leygarkvøldið kl. 20 við Reimund Langgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Porkeri
Kvinnumøti verður týsdagin kl. 20.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

SILVURBRÚDLEYP

4. mars hava hjúnini Hjørdis og Arne Mørk, Kolding silvurbrúdleyp. Adr.: Vestervænget 64, Vonsild, 6000 Kolding, Danmark.

27. mars hava Sunnuvá B. og Heri Jacobsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Norð á Viðareiði leygardagin 29. mars kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 456562 ella 216562 áðrenn 15. mars.

Hósdagin 27. mars hava Jóhanna og Eifinn á Reynatrøð, Leirvík, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 29. mars kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 443187 innan 20. mars.

BRÚDLEYP

Í dag, 1. mars giftast Hjørdis Thomsen og Claus Christensen í Havnar kirkju. Veitsla verður fyri innbodnum á Mikkjalstrøð 11 kl. 20.00.

Leygardagin 1. mars kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Erla Leitisstein Hansen, Runavík og Dánjal í Húsinum, Kollafirði. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Í dag, 1. mars giftast í Havnar kirkju Elisabeth Olsen, Hoyvík og Heini Jón Rasmussen, Oyndarfjørður. Dødurði er fyri innbodnum. Opið hús er aftaná í Gillagøtu 7, Hoyvík.

Í dag, 1. mars giftast Rúna Hansen, Skopun og Eddie Magnussen, Vágur. Vígslan verður í Býráðssalinum í Havn kl. 15.00 og veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 8. mars kl. 11 giftast í Oyndarfjarðar kirkju Leila Gaard, Oyndarfjørður og Marnar Dam, Norðskála. Vælkomst verður heima eftir kl. 19.00.

Leygardagin 15. mars giftast í Christianskirkjuni Kára Guðjónsson og Páll Olsen, bæði úr Klaksvík. Dødurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður á Tekniska skúla kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, eru vælkomin at ringja á tlf. 457278, 455608 ella 456192 innan 08.03.03.

Leygardagin 15. mars kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Dagbjørt Samuelsen, Fuglafjørður og Hjalmar Johannessen, Søldarfjørður. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at ringja á tlf. 449992, 441135 ella 444192 áðrenn 8. mars.

Leygardagin 22. mars giftast í Havnar kirkju Elinborg Petersen og Thorfinn Johannesen, Hoyvík. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 310174, 210174 og 313665 áðrenn 1. mars.

Leygardagin 5. apríl kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Eyðdis Johansen, Tvøroyri og Signar Skaalum, Hvalba. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 372415, 371469 ella 375190 áðrenn 16. mars.

Sunnudagin 6. apríl kl. 9.00 giftast í Dómkirkjuni Beinta Dahl Bærentsen og M. Fríðinn Nolsøe. Vælkomst verður á Hotel Føroyum eftir vígsluna. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at siga frá á tlf. 322263 ella 522263 áðrenn 10. mars

Missiónshúsið í Porkeri
Missiónsvikan byrjar týskvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Palla Petersen.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Sunnumorgin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangeliskt. møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Tilhaldið í Sandoynni
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.
Mikudagin 5. mars
Sólvá Nielsen sigur frá vitjan á Filippinunum.
Friggjadagin 7. mars
Upplestur, spøl.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfriggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo

Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319130/61 655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 3. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
Foðingardagur og ársfundur verður 12. mars kl. 15.00, val av einum tiltaksslimi. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.
Týsdagin 4. mars
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Tilveruhóttanin hjá monnum á langfaraskipum. Anna M. Simosen sjúkrarøktarfr.
Mikudagin 5. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Vitja smiðjuna í Litluvík
Hósdagin 6. mars
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen.
Friggjadagin 7. mars
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 **Frágreiðing um ENJO,** Tórharda Bláhamar

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Goymslulærlingur

P/F Wenzel søkir eftir lærlingi til eykalutagoymslu okkara.

Starvið umfatar í hævuðsheitum sølu av eykalutum og annað goymsluarbeiði.

Førleikakrøv: Koyrikort er neyðugt.
Fyrimunir eru at hava HH ella FHS, men er tó ongin trøyt.

Lærutðin tekur úr 2 árum uppí 4 ár, alt eftir hvørja skúlagongd ein hevur.

Skúlagongdin í lærutðini er í Danmark.

Umsókn saman við møguligum prógvum verður at senda til:

P/F Wenzel • Akranesgøte 5
Postboks 3043 • 110 Tórshavn
Att: Oddmar Ørvarodd.

Eru fyrispurningar, eru tygum vælkomin at ringja 354513 og spyrja eftir Oddmar, ella senda teldupost til: oddmar@wenzel.fo

Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka

mikudagin 26. mars 2003 kl. 17.00

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin
4. Uppskot til viðtøkubroytingar.

Nevndin setir fram uppskot um broyting av §10, stk. 2, í viðtøkum bankans, soleiðis at talið av nevndarlimum, valdir á aðalfundi, verður ásett til 4, og soleiðis at valskeiðið hjá nevndarlimunum verður ásett til 3 ár.

5. Val av nevndarlimum.

Jákup Jacobsen fer frá, tí skeiðið er runnið.

Nevndin mælir til, at valskeiðið fyri hinar nevndarlimirnar, valdir á aðalfundi (3), við gildi beinanvegin verður longt til 3 ár roknað frá tí, at limurin kom í nevndina.

6. Val av grannskoðarum.
7. Uppskot frá nevndini

Nevndin fær heimild til innan endan av mars 2004 at láta bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann vikja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.

8. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin eins og uppskot til viðtøkubroytingar liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi fríggjadagin tann 21. mars 2003.

Tórshavn, tann 28. februar 2003.

NEVNDIN

FØROYA BANKI